# Bakarin í Kollafirði 90 ár



Í dag fyllir Jacob Weyhe í Kollafirði, vanliga nevndur Bakarin, 90 ár. Hann var føddur og vaks upp í Porkeri. Foreldur hansara vóru Mortan og Elsebeth Maria Weyhe.

Jacob var tað sjeynda av tíggju systkjum, sum vóru Magnus, Lotta, Sofía, Petur, Hanneba, Judith, Jacob, Kristina, Emma og Leona. Umframt Jacob, eru bara systrarnar Emma og Leona eftir á lívi, og tær búgva báðar niðri.

Hóast hann var føddur inn í eina rætta skipara- og fiskifamilju og sjálvur var ein túr til skips sum 14 ára gamal, gjørdist sjógvurin ikki hansara lívsleið, tí sum 16 ára gamal fór hann til Havnar at standa í læru í bakarínum hjá Fossá. Seinni arbeiddi hann eisini eitt skifti sum bakari í Vestmanna og eitt skifti í Danmark, umframt at hann í fleiri ár arbeiddi hjá Frants Restorff í Havn, til hann í 1950 læt upp egið bakarí í Kollafirði.

Jacob giftist í 1949 við Annu, fødd Samuelsen, úr Kollafirði. Tey bygdu sær hús har, og Jacob gjørdi sær bakarí í kjallaranum. Arbeiðsbýtið teirra millum var at hann bakaði, og hon stóð í handlinum. Tey fingu fýra børn, Poulu, Erling, Elsu og Mortan, og Jacob hevur í dag níggju abbabørn og trý langabbabørn.

Ikki fyrr enn hann var 73 ára gamal í 1991 legði hann frá sær sum bakari og læt bakaríið í Kollafirði aftur. Tó hava bakaraovnarnir verið dúgliga brúktir síðani tí, tí leingi eftir at hann stongdi, bakaði Jacob til bæði familju og kenningar, og mong jólasteikin er eisini farin ígjøgnum ovnarnar, sum enn standa í kjallaranum.

Jacob og Anna, sum er 85 ára gomul, eru bæði væl fyri enn, hóast sín høga aldur. Sjálvt um Jacob er blivin eitt sindur lamin, gongur hann úti hvønn dag og gevur dunnunum at eta, og nú um summarið hevur hann úr at gera við at taka sær av dunnungum. Fyrr, tá hann var betur gongdur, tók hann sær eisini av seyði, men so langt niðan í bøin klárar hann ikki longur.

Higani skulu berast teimum báðum bestu ynski um mong og góð ár aftrat, og við hesum orðum vilja vit ynskja Bakaranum í Kollafirði hjartaliga tillukku við runda føðingardegnum!

**Skyldfólk**

# »Stand Up Show« á Patio

Fíggjakvøldið 27. juni verður "stand up show" við komikaranum Unnar Theodorsson í nýggju kaféini Patio, sum er í N. Finsensgøtu, niðan fyri bilstøðina Auto í Havn.

Unnar er upprunaliga úr Íslandi, men býr í Danmark, har hann eisini arbeiðir sum D.J.

Unnar hevur í Danmark arbeitt saman við kenda komikaranum Anders „Anden" Matthesen. Saman við Anders kemur danski rapparin Clemens, ið skal halda konsert í vikuskiftinum, eisini at framføra.

Um viðrar er ætlanin, at tað heila skal ganga fyri seg uttan fyri, á terassuni hjá Patio.

Hetta verður fysta tiltakið hjá Patio, men vit ætla at skipa fleiri øðrum tiltøkum við t.d. undirhaldi og tónleiki, verður sagt frá kaféini Patio.



# Próvtøkur á Tekniska Skúlanum

**Hósdagin 26. juni varð prógvhandan á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.**



*Húsasmiðir f.v.: Bjarni Djurhuus, Hvalvík, Einar Johannesen, Tórshavn, Hanus Højgaard Johansen, Tórshavn, Jákup Jacobsen, Hvalvík, Malmberg Olsen, Strendur, Reimar Napoleon Djurhuus, Tórshavn, Rógvi Jacobsen, Sandur, og Tórhallur Arnbjarnarson, Tórshavn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Andlát og jarðarferðir

**Elin Maria Gregersen, Syrðugøta**, vanliga nevnd **Ellemia**, andaðist í morgun, 82 ára gomul. Kistan fer úr heiminum í Gøtu kirkju fríggjadagin 27. juni kl. 18. Jarðarferðin verður sunnudagin 29. juni kl. 14.

**Ann Rose Danielsen** ættað av Argjum, andaðist í Keypmannahavn fríggjadagin 20. juni, 43 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 14.

**Mads Lützen,** lærari, búsitandi í Tórshavn, andaðist í heiminum mánadagin 66 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 14. Tey ið ynskja at minnast Mads, kunna lata Reyðakrossi Føroyar eina gávu, konta í peningastovnunum

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**Elin Maria (Ellemia) Gregersen**

Syðrugøtu

andaðist í heiminum hósdagin 26. juni, 82 ára gomul.
Kistan fer úr heiminum í Gøtu kirkju fríggjadagin 27. juni, kl. 18.00.
Jarðarferðin verður sunnudagin 29. juni, kl. 14.00.

*Vegna familjuna*

**Sæunn, Dagbjørt, Elin, Hallbera, Malan og Ólavur**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin